# Betri vinir

## Góði skúlaleiðari

Sum leiðari á einum skúla, ið arbeiðir við Betri vinum, hevur tú ein avgerandi leiklut í sambandi við arbeiðið viðvíkjandi trivnaði. Tá ið tú sjálvur ert við í arbeiðinum í Betri vinum, leggur tú støði undir eina barnamentan, har eingin happing fer fram, og á henda hátt gert tú stóran mun hjá teimum børnum, ið tú hevur ábyrgdina av.

Tú hevur týdning í sambandi við at breiða út virðini og sjónarmiðini hjá Betri vinum soleiðis, at tey floyma inn yvir tilgongdina og gerandisdagin í skúlanum – og ikki bara verða tikin fram til serlig høvi.

Vit mæla til, at tú lesur og heldur teg til tað, ið stendur í fakheftinum í Betri vinir-kuffertinum, herundir serliga tað, ið stendur í kapitlunum um ástøðiligu fatanina av happing og uppgávurnar hjá leiðaranum.

Á einum skeiði fyri leiðarar hevur tú eisini møguleika at fáa meira vitan um, hvussu tú fært so góða ávirkan sum møguligt við at arbeiða við Betri vinum.

## Trý góð ráð

Soleiðis skipar tú Betri vinir-arbeiðið:

### 1. Stovna ein samskipanarbólk

Samskipanarbólkurin tekur sær av dagligu leiðsluni av arbeiðinum við Betri vinum. Limirnir, ið t.d. kunnu vera námsfrøðingar úr frítíðarskúlanum ella lærararnir úr teimum ymsu flokkunum, virka sum tilfeingispersónar hjá starvsfelagum og foreldrum. Les meira um samskipanarbólkar í fakheftinum.

### 2. Tak skúlastýrið/foreldraráðið við

Skúlastýrini/foreldraráð kunnu vera virðismikil drívmegi í arbeiðinum við at fáa restina av foreldrunum við. Harumframt er tað eitt sera gott signalvirði, at skúlastýrið/ foreldraráðið luttekur í arbeiðinum og kunnar onnur foreldur um Betri vinir átakið.

### 3. Raðfest neyðuga tilfeingið

Nýggjar mannagongdir krevja tíð og umhugsan hjá einstøku starvsfólkunum. Raðfest tískil neyðuga tilfeingið. Tað er ein góð íløga.

VEND →

# Betri vinir

## Fyrimunir við at nýta Betri vinir
Betri vinir nøktar tørvin á ítøkiligum amboðum, og í programminum eru sosialar mannagongdir og ítriv, ið fyribyrgja happing. Við einføldum venjingum og stuttum vegleiðingum er Betri vinir lætt at taka við í ein skundmiklan gerandisdag.

Betri vinir kann eisini nýtast til at gera skiftið úr barnagarði í skúla so trygt sum møguligt. Programmið kann vera ein hjálp í samstarvinum millum lærarar og námsfrøðingar og tryggja, at børnini møta somu virðum og hugtøkum bæði í barnagarði og skúla.

## Og tað besta: Betri vinir riggar
Allar kanningar benda á, at Betri vinir riggar.

Ein eftirlitsbólkakanning, ið Rambøll gjørdi í 2017 vísti t.d., at børn á stovnum, har arbeitt var miðvíst við Betri vinum, vístu meira kenslur, komu við sínum ískoyti til jalig sambond og vístu meira innliving samanborið við børn á stovnum, ið ikki arbeiddu við programminum.

Eisini hjá teimum vaksnu sæst ávirkanin: 88 % av sløkum 500 spurdum fakpersónum, ið hava verið á grundskeiði í Betri vinum, uppliva, at arbeiðið við Betri vinum elvir til ein umsorgarfullari felagsskap millum børn, har tey taka øll børn við í felagsskapin, og 85 % uppliva, at starvsfólkini leggja størri dent á trivnað og fyribyrging (Oxford, 2013).

Les meira um ávirkanina av Betri vinum á **www.betrivinir.fo**

**Góðan stuttleika við týdningarmikla arbeiðinum!**

### Vit mæla til
Vit vita frá royndum, at jú fleiri starvsfólk, ið hava verið á skeiði í Betri vinum, jú betri og tryggari støði fær tykkara arbeiði við fyribyrging. Harafturat mæla vit til, at starvsfólk, ið arbeiða við Betri vinum, koma á eitt modul-skeið ella eitt ítrivsskeið, so hvørt sum arbeiðið við Betri vinum gongur sína gongd. Les meira um skeiðini á **www.betrivinir.fo**

**Fylg okkum**
**á Facebook**
**Betri vinir**
**– Fri for Mobberi**
**og á**
**www.betrivinir.fo**



Mary Fonden H.K.H. Kronprinsesse Marys Fond · Red Barnet · barnabati · NÁM · BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ Ministry of Children and Education